# Tunnilin er eitt agg-

**TUNNIL** – Hvørt einasta val fáa vit lovað, at NÚ kemur tunnilin altso, men einki er hent til denna dag. Eg skilji bara ikki, hví myndugleikarnir blíva við at drála í hesum spurningi, sigur Niels Olaf Eyvindsson úr Hvalba. Hann er ein av teimum mongu sum framvegis bíðar eftir einum nýggjum Hvalbiartunli – higartil uttan úrslit. – Tað skal ikki meiri enn hønuvit fyri at síggja, at tunnilin er eitt agg-etandi gamal hol sum er bæði vandamikið og ótíðarhóskandi. Heilt erliga, havi eg ikki nøkur pen orð at brúka fyri at lýsa støðuna hjá okkum

Snorri Brend

**Hvalba:** - Tað burdi verið so einfalt at tikið eina avgerð um ein nýggjan tunnil. Men her fáa vit ikki stórvegis stuðul frá landsins myndugleikum, slær Niels Olaf, sum eisini er bygdaráðslimur í Hvalba. fast.

Bæði hann og hundraðtals onnur fólk skulu hvønn einasta dag koyra gjøgnum henda tunnilin, sum varð gjørdur í 1963. Nú hava tey fingið at vita frá landsstýrinum, at ætlanin um nýggjan Hvalbiartunnil er skotin út í minst fimm ár aftrat, heilt til 2016.

Hetta er fallið mongum hvalbingi og mongum sandvíkingi fyri bróstið.

- Hetta er einki minni enn ein niðurgerð og ein gíðslatøka av einum parti av landinum, sum haraftrat er afturútsigldur, sigur Niels Olaf avgjørdur. - Eg vóni ikki at tað er ov leingi at bíða líka til 2016.

Hann vísir á, at teir einaferð tosaðu um at byrja í 2011. So bleiv tað til 2013, og nú altso enn longur út, samstundis sum tunlarnir eldast ár undan ári.

- Nei, eg vóni ikki at tað er ov seint, tí vandin er altíð fyri at okkurt álvarsamt kann henda. Hetta málið hevur í øllum førum skund.

## Tons undir lofti

Liðin eru brátt 50 ár síðani tunnilin til Hvalbiar varð skotin ígjøgnum, og tað á fyrsta sinni bar til at koyra til Tvøroyrar.

Tá var talið av bilum ikki serliga stórt, og teir vóru eisini av øðrum kaliber enn í dag. Men nú er mangt sum bendir á, at hann hevur tænt fyri seg.

Í einum lesarabrævi hevur sami Niels Olaf víst á, at tað er ikki gott at vita, hvussu nógv 100 tons ið sita leys undir tunnilsloftinum og kanska detta niður ein dag.

- Eg eri ikki serfrøðingur á økinum. Men eg kundi eisini hugsað mær at vita, hvønn skaða ið frostið hevur gjørt og framvegis ger á báðar tunnilsmunnarnar.

- Har er loftið haraftrat tunt, og tí eru hetta viðurskifti, ið eingin kann útgreina til fulnar ella garantera uppá nakran sum helst máta, vísir hann á. – Eg trúgvi bara, at tað er "Onkur" sum heldur hondina yvir okkum. Tað er tað sum eg gangi út frá.

Samstundis sum ferðslan er økt og er vorðin tyngri, hava fólk í ávísan mun gjørt vart við støðuna tey seinastu 20 árini ella so.

- Nógv brøv eru farin higani frá og til landsins myndugleikar, og øvugt, kanska mest tá tíðirnar vóru góðar. Men so skiftir aftur, og so tosar ein um kreppu ein dag og yvirupphiting tann næsta. Og soleiðis hevur tað gingi øll hesi árini.

- Men eg seti ofta mær sjálvum tann spurningin, hvar samvitskan er hjá hesum ábyrgdarpersónunum.

## Bundin

Fyri Niels Olaf er eingin ivi um, at hesin tunnilin sum tann elsti í kongaríkinum, bæði má og skal dagførast til tørvin í 2011.

Hann hevur tí í talu og skrift gjørt vart við hesa støðuna, og tað ger hann fegin enn einaferð, nú umboð fyri Oyggjablaðið hava sett honum stevnu við tunnilsmunnan Hvalbiarmegin.

- Hetta má gerast nú, ongatíð ov skjótt, er hansara greiða útmelding til landsins politikkarar.

Eftir hansara sannføring er nógv ið talar fyri eini slíkari dagføring: Ein stór og ein minni bygd eru fullkomuliga bundnar at hesum sambandinum; í Hvalba er nógv virksemi á flakavirkinum; fleiri fólk norðanfyri arbeiða aðrastaðni í oynni; fleiri fólk koyra til Hvalbiar at arbeiða; og rættiliga nógvur tons av fiski verða koyrd bæði til Hvalbiar og frá Hvalba.

- Skal ein tí tosa um at framhaldandi menning, er neyðugt at vit fáa ein størri og tryggari tunnil sum skjótast.

snorri@sosialurin.fo



**ÓTÍÐARHÓSKANDI**

*Nógvir hundraðtals bilar koyra gjøgnum Hvalbiartunnilin hvønn einasta dag. Tað eru kortini ikki allir teir størru bilarnir, ið sleppa ígjøgnum og er hetta til stóran ampa fyri vinnulívið í Hvalba. – Vit hava gjørt vart við støðuna í mong ár, men sum er verður ætlanin bara útsett og útsett, sigur Niels Olaf Eyvindsson, bygdaráðslimur í Hvalba*

*Mynd: Jens Kristian Vang*